# Tekniskur leiðari til Vestmanna Kommunu

Í sambandi við at Tekniski leiðarin hjá okkum tekur við nýggjum avbjóðingum, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Tekniski leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Teknisku deild hjá kommununi um hendi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar**

- at hava dagligu umsitingina av øllum tekniskum útbúnaði hjá kommununi.
- málsviðgerð og ráðlegging.
- tilrættalegging og stýring av kommunalum uppgávum – eisini peningaliga.
- at standa fyri útbjóðingum og gera tilmæli til avvarðandi nevndir í bygdarráðnum.
- bygdar- og byggiætlanararbeiði.
- projektering og eftirlitsarbeiði.
- at standa fyri og menna skrásetingararbeiðið av tekniskum leiðingum.

**Vit vænta, at tú**

- er byggifrøðingur, verkfrøðingur, arkitektur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.
- hevur leiðsluroyndir, torir at taka skjótar avgerðir og standa við ábyrgd.
- dugir væl at samskifta við onnur og hevur góðan skriviførleika.
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka m.a. skrivi- og tekniforrit.

**Vit bjóða tær**

- góða løn til rætta førleikan.
- møguleika fyri skeiðum sum varða av arbeiðsøkinum.
- eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg persónliga.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku nevnd og borgarstjóran.
Lønar- og setnaðarviðurskifti eru við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg? Send okkum eina umsókn til:

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**
Umsóknir skulu merkjast **"Tekniskur leiðari"**

Umsóknin má verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl. 2006. Miða verður eftir at seta starvið frá 1. juni 2006 ella eftir avtalu.

Hevur tú fleiri spurningar? Ring á tlf. 47 01 15 og fá meira at vita um starvið.

*Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.*

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

**Vestmanna Kommuna**
www.vestmanna.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O



Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosialari samveru og fáa eitt mennandi tilboð saman við neyðugu venjingunum.

Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn.

# Dagstovnurin Reiðrið søkir starvsfólk

Søkt verður eftir starvsfólki til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi. Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum sjúkrarøktarfrøðingur, námsfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur ella aðrar drúgvar viðkomandi royndir á økinum.

Starvið verður sett við einum vikuligum tímatali uppá 30 tímar at byrja skjótast tilber.

**Vit ynskja**

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

**Í tí dagliga arbeiðinum leggur Reiðrið dent á**

- at hava fyrilit til menningina, aldrinum og tørvinum hjá tí einstaka barninum
- at tað er gott samband og tilknýti ímillum tað einstaka barnið og starvsfólkið
- at barnið kennir seg sum ein týdningarmiklan lið í einum sosialum felagsskapi
- at menna samskifti, sjálvhjálp og sjálvsvirði
- tryggleika, umsorgan og nærveru
- virksemi, sum hóskar til aldurin og menningina hjá tí einstaka barninum.

**Vit kunnu bjóða**

Eitt áhugavert starv, har tú saman við øðrum fakfólki og hjálparfólkum fært møguleika fyri at seta dám á stovnin.

**Meir fæst at vita**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 447003.

**Umsókn**

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 8. mai 2006 kl. 12.

**Send umsóknina til:**

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80